


# Faroe Petroleum gevst í Íslandi

Deil:

**Jan Müller**

27.01.2015 - 20:28

Oljan.fo

Oljufelagið Faroe Petroleum er ikki longur partur av leitingini eftir kolvetnum í Íslandi. Eftir at hava gjørt sítt heimaarbeiði, sum eru kanningar av ymsum slag í økinum, sum felagið fekk tillutað í seinastu útbjóðingini, er felagið komið eftir, at einki er at fara eftir í loyvinum eystan fyri Ísland.

Nils Sørensen, stjóri sigur við oljan.fo, at kanningarnar, sum felagið hevur gjørt av undirgrundini í loyvinum, vísa, at møguleikarnir fyri at olja ella gass kunnu vera tilsteðar, eru so gott sum ongir. Hetta tí at loyvið liggur í einum jarðfrøðiligum øki, har olja ikki kann verða goymd, staðfesta kanningarnar.

Við avgerðini at gevast við oljuleitingini í Íslandi hevur Faroe Petroleum nú heilt slept Norðuratlantshavi. Felagið royndi nøkur ár herfyri at fáa loyvi í grønlendska leitiumfarinum men varð ov stutt. Síðani eydnaðist felagnum at fáa lut í einum av fleiri loyvum í Íslandi saman við norska felagnum Petoro og einum íslendskum felag. Hóast Faroe Petroleum hevur takkað fyri seg í Íslandi, so er kortini framvegis lív í leitingini, har eitt íslendskt, eitt norskt og eitt kinesiskt oljufelag luttaka.

Faroe Petroleum var í mong ár við í oljuleitingini í Føroyum, men eftir fleiri miseydnaðar boriroyndir og nógvar kanningar tók felagið í 2013 avgerð um at gevast í Føroyum. Kortini hevur felagið framvegis skrivstovu í Havn. Nú leggur felagið alla orku í at leiti- og framleiðsluvirksemi í Norðsjónum og í Barentshavinum.